# Undirbeat pumpar Patio upp fríggjakvøldið



*Spencer Jones er ein av Djunum í Patio fríggjakvøldið*

**Vit kunnu hava tað stuttligt allastaðni, um vit bara brúka knokkin at skapa stuttleikan við. Og hesa ferð er tað Patio, ið stendur fyri skotum, og sum í skrivandi stund verður pimpað og prýtt til at kunna hýsa Undirbeat hetta fríggjakvøldið**

Seinast Undirbeat var í miðbýnum, var í mai mánaða, stutt áðrenn vit gjørdust takleys og fóru at fjakka kring landið til lagurbygningin á Heygsvegnum, Grundina á G! Mini, Skanskan á Ólavsøku, neystið hjá Aksel á Ovastevnu og framsýningarhølið í Skipasmiðjuni.

Fríggjakvøldið vera vit aftur stødd í hjartanum í Havnini, tá vit saman við Patio fara at bjóða frískar elektro rútmur heilt frá kl 21 og langt út á náttina. Kvøldið byrjar við einum serliga Undirbeat-útvaldum playlista, hondgjørdur at hanga út til og blíva peppaður til teknodansing av, meðan Patio bjóðar alskyns leskiligar drykkir úr barrini. Frá midnátt og restina av náttini er elektro DJing á skránni frá eyðkenda frískdansandi spirrivippinum McLovin, sum hevði sína DJ debut til Undirbeat í fjør, og orkumikla Spencer Jones, ið ferð eftir ferð hevur prógvað fyri okkum, at tað er eingin veitsla, hann ikki kann fáa í kók.

Latum okkum tí øll hittast aftur til gleði og gaman í okkara flottasta purpuri og dýrasta líni til Undirbeat í hetta fríggjakvøldið. Vit gleða okkum at royna Patio av.

Kostnaðurin er 70kr og aldursmarkið 18 ár. Opið er frá 21-04.

Undirbeat í Patio, fríggjakvøldið 19. september 2008.

---



## Skráin fyri Rás 2

### Hósdagur 18. sept.

15:00 Tíðindi
15:10 Seinnapartsending – Heri Simonsen og Eyðfinn Drewsen eru vertir.
16:00 Tíðindi
16:05 Seinnapartsending – framhald
17:00 Tíðindi
17:30 Vespureiðrið – Sending um og við NSÍ-fólki. Jonhard og John eru vertir.
18:30 Tíðindi
18:45 Tónleikur
19:00 Morgunendursending (e)
21:00 Orð á leiðini – Sending hjá EVR. Jógvan Zachariassen leggur til rættis
21:30 Tónleikur
22:00 Føroyar mítt land
22:05 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land
23:05 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Fríggjadagur 19. sept.

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land – Magnus Gunnarsson leggur til rættis
08:05 Bilradio (e)
09:00 Føroyar mítt land – Magnus Gunnarsson leggur til rættis
09:05 Morgunsending – Mirjam Pætursdóttir og Eyðfinn Drewsen leggja til rættis
10:00 Lýsingar
10:05 Morgunsending – heldur fram
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsending – heldur fram
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttur leggur til rættis. Send eina heilsan umvegis www.ras2.fo
15:00 Tíðindi
15:10 Hetta vikuskiftið – Rógvi Nybo og Harald í Kálvalíð eru vertir
16:00 Tíðindi
16:05 Hetta vikuskiftið – framhald
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Tónleikasending hjá Heimamissiónini
22:00 Føroyar mítt land – Magnus Gunnarsson leggur til rættis
22:10 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land
23:05 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Leygardagur 20. sept.

07:00 Tónleikur
11:00 Vespureiðrið (e)
12:00 Tónleikur
13:00 Bilradio (e) – Maggi Gunnarsson er vertur
14:00 Tónleikur
21:00 Halleluja – Heine Lützen ella Andrew Djurhuus leggja til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Sunnudagur 21. sept.

07:00 Gospel tónleikur
10:00 Úr skjáttuni (e) – Prát við Heðin Poulsen um Global Leadership Summit (GLS). Ejvind Mouritsen leggur til rættis.
11:00 Tónleikur
11:30 Á Torginum (e)
13:00 Føroyar mítt land
13:40 Tónleikur
14:00 Lýsingar
14:05 Tónleikur
15:00 Lýsingar
15:05 Tónleikur
17:00 3. Hálvleikur – Heri Simonsen er vertur
18:30 Tónleikur
20:00 Reflex (e) – Ungdómssending hjá Heimamissiónini
21:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

tróndur & levi



## Bilradio (e)

### – Fríggjadagin kl. 08.05

Í bilprátinum verður tosað við Trónda Sigurðsson og Levi Nybo, sum báðir læra at selja bilar á hvør síni bilasølu. Í biltíðindunum hoyra vit m.a. um at komandi ár kemur ein heilt nýggjur sportligur Porsche luksus sedan við fýra hurðum á marknaðin. Tosað verður eisini við formannin í Harley-Davidson Club Føroyar, Heina Restorff, um felagskapin og um eina Harley vitjan í hesi vikuni.

## Á Torginum (e)

### – Sunnudagin kl. 11.30

Prát við Bjarna Jacobsen, ættaður úr Svínoy. Absalon Absalonsen er vertur.

RÁS 2 ...títt radio